# MEST minkar í umsitingini



**STJÓRIN**

Talan er um sera dugnalig starvsfólk, sum vit kenna okkum noydd at siga úr starvi. Men soleiðis eru fyritreytirnar nú einaferð, sigur Frithleif Olsen

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**UPPSAGNIR - Kostnaðurin fyri umsitingina er vorðin ov stórur í mun til minkaða virksemi, og tí noyðast vit at taka hetta stigið, sigur Frithleif Olsen, stjóri í samtakinum MEST**

Vilmund Jacobsen

Samtakið MEST, sum eitt nú eigur og rekur skipasmiðjurnar í Havn og á Skála og fyrrverandi FJM í Runavík, segði í síðstu viku fýra fólkum í umsitingini úr starvi.

Tey uppsøgdu eru figgjarleiðari, søluleiðari og tvey skrivstovufólk, harav annað arbeiddi hjá dóttirfelagnum hjá MEST, Pam Ofshore Service.

### Tillaging

Frithleif Olsen, stjóri í MEST, sigur, at samtakið noyðist at tillaga seg broyttu umstøðurnar, nú færri skip eru í føroyska fiskiskipaflotanum, sum aftur merkir minni virksemi hjá samtakinum.

Hann sigur, at í hesum førinum snýr tað seg um, at kostnaðurin fyri umsitingina er vorðin ov stórur í mun til virksemið, men hann leggur samstundis dent á, at talan er um sera dugnalig starvsfólk, sum samtakið nú kennir eg noytt til at siga úr starvi.

- Men soleiðis eru fyritreytirnar nú einaferð, leggur hann aftrat.

### Neyvan fleiri

Tá Sosialurin tosaði við stjóran í MEST seinnapartin í gjár, spurdu vit hann eisini, um hugsandi er, at samtakið fer at siga enn fleiri fólkum úr starvi.

- Ætlanin er ikki at siga fleiri fólkum úr starvi, sigur Frithleif Olsen.

Hann vísir á, at tað, sum felagið í enn størri mun vil brúka orkuna uppá, verður at royna at útvega samtakinum meiri arbeiði.

- Skipatalið í Føroyum er minkað so nógv seinnu árini, at neyðugt er at hyggja út um landoddarnar fyri at royna at fáa sáttmálar, so vit kunnu varðveita flest møgulig arbeiðspláss í samtakinum.

Frithleif Olsen sigur, at samtakið eisini gjarna vil hava umstøður til at taka lærlingar inn, sum hann heldur er ógvuliga týdningarmikið fyri eitt samfelag sum Føroyar.

### Ikki endaligt

Vit spurdu eisini stjóran í MEST, hvussu árið í fjør royndist figgjarliga.

- Vit hava ikki havt aðalfund enn, og eg haldi ikki, eg fari at siga nakað um úrslitið, fyrr enn aðalfundur hevur verið um nakrar dagar, sigur Frithleif Olsen.

Spurdur, um samtakið væntar at fáa samanhang í raksturin í 2010, sigur stjórin, at tað vónar hann.

- Eg vóni, at vit fáa samanhang í raksturin í ár. Í løtuni er nógv at gera, og vit vóna, at arbeiði verður rímiliga støðugt gjøgnum árið. Men enn er ov tíðliga at siga nakað um hetta, sigur Frithleif Olsen, stjóri í MEST.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Fáa ikki fiskað fyri makreli

**MAKRELUR Líkt er til, at rættiliga nógvur makrelur er sunnarliga í føroyskum sjógvi í løtuni, nú svartkjaftaskip hava trupulleikar við at royna um náttina, tí so nógvur makrelur er uppi í veiðini**

Vilmund Jacobsen

Í seinastuni hevur rættiliga nógv verið gjørt burturúr, at so nógvur makrelur hevur verið í føroyskum sjógvi í summarhálvuni seinnu árini.

Líkt er ikki til, at árið í ár verður øðrvísi enn undanfarnu tvey árini.

Sagt verður av fiskileiðunum, har svartkjaftaskipini nú royna sunnarliga í føroyskum sjógvi, at so nógvur makrelur er í havinum, at skipini stundum ikki fáa fiskað um náttina.

Enn eru makrelloyvini ikki útskrivaði, og tískil hava føroysku skipini heldur ikki loyvi at veiða makrel.

Á leiðunum í føroyskum sjógvi, har svartkjafturin stendur, royna eisini norðmenn, íslendingar og russar.

Herfyri var Fiskiveiðieftirlitið á hesum leiðum og kannaði eitt nú veiði og reiðskap, men tá vit frættu, hevði eftirlitið ikki staðfest brot á galdandi reglur.

*vilmund@sosialurin.fo*



**IKKI ROYNANDI**

*Av fiskileiðunum sunnarliga í føroyskum sjógvi frættist um dagarnar, at skip í einstøkum føri hava verið noydd at slept stórum hálum av makreli útaftur*